

*Kongavitjan í Oyndarfirði. Undir liðuni á kongi er Henrietta.*



*1945 við "Smut". Andrias Klein í bakborðstofti og Tummas Anthoniussen á stýriborðstoft.*

undir oyggjarnar norðuri í Djúpunum. Teir fingu tvær stórar hýsur á bát í 1927, tað var alt. Tað seinna árið, tá eg var við, kom eingin hýsa á bát. Hetta var í 1928. Fiskurin var eisini smáur tað árið. Men ein dag fingu vit fisk. Tað var tann einasti dagurin, vit fingu ordiliga av fiski. Vit settu 42 stykkir, 6 línur, 6-7 stk línir. Tá var so nógv á, eg minnist Dánjal Abrahamsen fór at draga og eg at taka ímóti. Eg var so kaldur, eg hevði róð sveittur og so bíðað eftir lýsing. Tað varð skjótt, at eg bleiv heitur, so nógv var á. Vit avreiddu 1100 pund og býttu ein tøðleyp í part av sovorðnum, sum var niðan fyri 16 tummar. Fiskurin kostaði 6 oyru pundið. Eg hevði gjørt mær eina nýggja línu til, og eg fekk akkurát fyri hana tann veturin.

Eg gavst við tí útróðrinum, tí eg tímdi ikki. Man var til skips hina tíðina og fortjenti væl. Tá hevði eg fingið ein lítlan bát, og eg gjørdi tað betri at rógva við tí bátinum, og tað var eisini nógv fittligari. Vit plagdu et egna einar tvær línur um kvøldið og seta tær í lýsingina. So svav man um náttina, og vit fingu akkurát líka frægt burtur úr.

Var ein løta, kundu vit eisini altíð fara at dyrgja ella við snøri. Vit fingu nokk av døgurðamati og nokk av fiski.

### Bátar av Hellunum

Tá gingu fýra bátar út av Hellunum. Tað var "Roynd-in", "Karis", "Hvalurin" og "Immanuel".

So var tað Jóan Pauli Thomsen, hann leigaði ein bát frá Karl á Lag, sum kallaðist fyri "Rosa". Hann átti hann eisini eina stutta tíð, og lat hann so aftur til Karl á Lag. Men seinni leigaði hann ymiskar bátar úr Suðuroy til at rógva út við um várarnar. Tann fyrsti sum eg veit um at hann hevði, tað var "Skortur". Hann var tveymastraður og mundi vera um 14-16 tons. Hann varð keyptur til Víkahandilin seinni. Petur Klein hevði hann, og hann førdi sand við honum. Teir leigaðu ymiskar bátar. "Føroyingurin" úr Vági var ein. Niklas Lassen, sum var motorpassari við "Lauru", var í Oyndarfirði og róði út árið fyri sum hann gekk burtur, so oyndfirðingar kendu hann væl.

### Meira frá William Clowes

Eg kom at hugsa um fyrsta árið við William Clowes. Tað var í 1924. Tað vóru einir 6-7 viðingar við, og Jóan Magnus Thomsen úr Syðrugøtu var skipari. Hann hevði siglt við Magnus á Viðareiði og hevur kent nógvar viðingar. Tað vóru tríggir adventistar við, og teir komu við treytað av, at teir skuldu halda frí leygardag og fiska sunnudag. Teir vóru Jóannes í Innistovu, sum átti skonnartina "Sjey Systkin", sum hann lat byggja í 1932. Sonur hansara Henry var við fyrsta árið, hann var til skips, og so var tað Sofus Olsen. Jóannes var ein sovorðin kempa og sterkur maður. Hetta var annað árið, at gummistivlar vóru at fáa. Tað gekk illa hjá honum at fáa stivlar sum passaðu, tí teir vóru ov trongir í íferðina. Hann fekk so einar einaferð.

Eg minnist, at Jóannes stóð aftan fyri stórvantið. Dýpið sum Jóan Magnus royndi á Eysturlandinum var fyri tað mesta tvey stykki vatn. Jóannes hevði sovorðnar kreftir, at tá tað háláði út, so koyrdi hann eitt tveypunds lodd afturat. Tí var loddið 14 pund, og tað vísti seg ikki at standa á hjá honum. Eg minnist, at hann fortaldi fyri mær seinni, tá eg onkuntíð hitti hann, at hann var so harmur um tað, at hann hevði dyrkað tvær traðir upp á Viðareiði, tí eingin var at taka aftur.

Hann átti tríggjar synir, og eg var saman við øllum trimum. Ein lítlan heysttúr í 1934 var eg saman við Ness og Aksel, teimum yngru.

### Mundi doyð í flotkeldu

Tað var í 1928 ella 1929, at eg var við "Irex" á Skála. Eg hevði verið heima og hevði havt klæðini heim við mær. Nú skal eg fara avstað aftur, og tað er at fara til gongu eftir Heltnini. Sigfred beiggi mín, sum var 14 ára gamal tá, hann var við mær til at bera.

Tað var svalligt at ganga, so eg lat meg úr og gekk skóleysur og royndi at raka onkran vátan plett, har vi gingu. Tá vit komu yvir gøtumegna, og eg traðki einastaðni, har væta er, so er tað ein flotkelda. Nú føli eg ikki botn við fótinum. Eg kom at hanga sum í leysari luft, og eg kom at hanga á posanum. Tá føldi eg eisini líka sum ein lítlan pall, har eg kundi steðga á. Og so Sigfred at royna at hála meg upp. Eg hevði ikki komið upp aftur einsamallur. Hetta hevur verið eitt tað nærmasta, eg havi verið deyðanum, og so skuldi tað enntá vera á landi at eg mundi drukna. Ikki hevði eg sæst aftur heldur, um eg druknaði har. Teir gomlu plagdu at siga at fara undir heilt, men mangt kríatúr man hava fingið ta lagnu.

### Grindabáturin

Í nýggjari tíð er ein bátsvanlukka hend í Oyndarfirði, og hetta var í eini grind í 1939 í Hvannasundi, og millum aðrar bátar var eisini eitt seksmannafar úr Oyndarfirði. Veðrið var gott, og tað gekk alt upp á tað besta, men meðan teir skera upp, helt onkur, at best var at skunda sær eitt sindur, tí tað var ikki vist, at veðrið fór at halda sær. Teir fara so avstað heim til Oyndarfjarðar, hóast tað var seint. Men tað gjørdist rættiligt ruskveður vestaneftir. Teir royndu at blaka grind út fyri at lætta um, men tað kom eitt so øgiligt rennikavaæl, og hildið varð, at tað var tá, at báturin holvdist.

Múlamenn høvdu eisini verið í grind og vóru við at bera grindina til hús, tá teir halda seg hoyra okkurt, men teir síggja einki í myrkrinum. Tó skiltist skjótt, at her ruggaði ikki rætt, og menn vórðu vaktir. Tá hoyrdust eisini neyðarróp. Teir fingu tó ikki sett bát út í Múla og ringdu inn í Sund at biðja teir fara at hjálpa. Tó batnaði veðrið kortini so mikið eina løtu, at teir fingu flotað bát í Múla. Oyndfjarðarbáturin var tá rikin yvir móti Viðareiðishellu, og bert ein maður var eftir á kjøli, og var hetta Hendrik á Kinn. Teir sum umkomust vóru Karl í Hálvmørk, Sofus Rinkustein og Hendrik í Heiríksstovu, allir av raskastu monnum. Eftir Karl sótu kona og trý børn, og eftir Sofus sat kona við ársgomlum soni. Hinir báðir vóru trúlovaðir.

Hendrik var rættiliga illa fyri, tá múlamenn komu til, men hann kundi greiða frá, hvussu nógvir, ið teir høvdu verið, og at hinir vóru farnir. Motorbáturin sleipaði so bátin inn í Sund, og hinir fingu Hendrik til hús. Hann var leiddur inn til Símun, sum fór í song við honum fyri at fáa hita í hann aftur. Hann var har norðuri nakrar dagar, til hann kom nakað fyri seg aftur.

### Kundi eins væl sjálvur verið farin

Eg kundi eins væl verið farin í hesi vanlukku. Tað var ein leygardag, at grindaboðini komu. Eg var staddur heimi í Stórustovu hjá Martin Klein. Her sat eisini Hendrik í Heiðrikstovu. Vit vóru allir kammeratar. Hann sat har, og hann ætlaði sær í grind, og hann trúgaði meg at koma við. Eg segði nei, mær dámdi einki at fara í kirkjutíð, tí tað fór at koma inn í kirkjutíð sunnudag, áðrenn vit komu aftur. Tað var tað síðsta hann segði við meg, tá hann fór úr stólinum, og vit sóust ikki aftur. Eg og Meinhard Emil, Meinhard Joensen, vit lossaðu tilfarið til húsini hjá Hendrik Hammer hendan leygardagin. Tað var fínasta veður, og Meinhard hevði fingið skaða í ein fingur. Tað gjørdi, at hann fór ikki við, teir vóru eisini kammeratar. Onkur hevði biðið lovað sær við men slapp ikki við. Eg minnist so væl tað sunnukvøldið. Um 9 tíðina koma vit av møti, og pápi Sofus Rinkustein, Klæmint Joensen, hugdi upp í luftina yvir Skarðið. Hann var so grískur yviri í Skarðinum. Tað var ein ótti tá á øllum. Tað vísti seg, at teir hoyrdu ymiskt fyri sær. Báturin hevði páhangsmotor, og tað var, sum um tey hoyrdu glintan. Eg fari so í song og frætti einki fyrr enn morgunin eftir um hesa ólukkuna.

### Aðrar vanlukkur

So fari eg eftir torvi. Tað er gott veður, og eg komi í fylgi við Høgna Høgnesen á Grunnlendi. Vit komu at fylgjast fram á Helvtnina.

Kráirnar vóru so nær hvørjari aðrari fram við Halgafelli, sum vit rópa. So spyrji eg hann, um hann veit um bátar, sum fyrr eru burturgingnir úr Oyndarfirði.

Hann sigur, at tað vóru tveir bátar, sum hann visti um, og báðir høvdu mannskap av Grunnlendi, júst húsinum, sum hann var úr. Hann sigur árstalið nær tað var. Og tað var í 1749. Kumpassin kom aftur báðu ferð. Annar báturin gekk burtur fyri Fjallinum og annar úti við oyggjunum.

Um hesa tíðina fór ein neytakona í Laksá, hon var eisini av Grunnlendi. Tað varð eitt neyðarhús har, tí tað var einki mannfólk at arbeiða garðin. Tað merkiliga við tí er, at Freydis hevur kannað øll skjøl, og hon finnur onga staðni hetta skrivað uttan tað, at tað er skift eftir Jógvani Olsen á Grunnlendi í 1949, og tá er skilað til, at hann doyði á sjónum árið fyri.